

**Edmund Joensen**
*løgtings- og fólkatingsmaður*

# Hoydal í DK-pressu: Fyrst nýggja grundlóg og so samráðing um loysing

*Ongin kann longur ivast í, at uppskotið til stjórnarskipanarlóg er ætlað at loysa Føroyar úr Ríkisfelagsskapinum.*

Tað, sum Fullveldislandsstýrið ikki fekk ígjøgnum í samráðingum við donsku stjórnina í ár 2000, skal nú røkkast við uppskotinum til nýggja stjórnarskipan.

Lógaruppskotið er ein fullveldisgrundlóg, og endamálið við henni er at loysa Føroyar úr Ríkisfelagsskapinum og at stovna eitt fullveldisríki.

Lógaruppskotið liggur í løtuni í rættarnevndini hjá Løgtinginum.

Føroysk pressa ger lítið og onki við málið, hóast tað fær avleiðingar fyri øll í Føroyum, um tað verður samtykt. Tað hava fullveldiskreftirnar fyrimun av, tí so kunnu tær lirka uppskotið inn gjøgnum bakdyrnar.

Í danskari pressu fæst tó mangt og hvat at vita.

## Leggur upp til samráðing um loysing

Mikudagin hevði avísin Berlingske Tidende tíðindi um loysingargrundlógina á forsíðuni. Inni í blaðnum verður greitt nærri frá málinum, og har er eisini eitt sera áhugavert sitat frá Høgna Hoydal, formanni í Tjóðveldi.

Hoydal sigur soleiðis við blaðið:

»Vi laver vores egen grundlov, og det bliver så vores grundlag for, hvordan vi forhandler videre med Danmark om de statsretlige rammer«..



Hetta er sera áhugavert, tí í hesum setningi avdúkar Høgni Hoydal, hvørja ætlan hann í veruleikanum hevur við stjórnarskipanarlógini.

Tjóðveldi vil, við øðrum orðum, at stjórnarskipanin skal fatast sum ein nýggj føroysk fullveldisgrundlóg, ið skal avloysa verandi grundlóg og heimastýrislógina. Tá Føroyar soleiðis eru skeklaðar úr verandi stjórnarskipanarligu rammum, sum vit vanliga nevna Ríkisfelagsskapurin, ætlar Høgni Hoydal, at samráðingar skulu vera við Danmark um »de statsretlige rammer«. Tað merkir, at samráðast skal um loysing.

Hetta seinasta – at samráðast skal um loysing – er tað serliga áhugaverda.

Hetta er tað, sum Tjóðveldi og aðrar fullveldiskreftir í Løgtinginum og politiska umhvørvinum, ikki viljað tosa hart um í Føroyum.

Hetta eru samráðingarnar, sum undir Fullveldislandsstýrinum í ár 2000 rendu seg fastar og slitnaðu.

## Talar við fleiri tungum

Hetta, at Føroyar við nýggju stjórnarskipanini skulu loysast úr Ríkisfelagsskapinum og samráðast um »rammurnar«, er sum nevnt ikki nakað, sum Tjóðveldi tosar hart um í Føroyum.

Nei, her í landinum verður ein onnur útgáva av sannleikanum brúkt.

Soleiðis hevur tingmaðurin Sjúrður Skaale roynt at tosað um, at alt fer at laga seg aftaná, at lógin er samtykt. Tá fara øll at vera »vinnarar«, letst hann at halda. Í grein herfyri skrivar Sjúrður m.a., at »allir teir juridisku spurningarnir nokk skulu falla uppá pláss aftaná«.

Hetta er sjálvandi politiskt vrøvl, og tey, sum lesa sitatið hjá Høgna Hoydal omanfyri, síggja, at aftaná er ætlanin, at nakað heilt annað skal henda.

Poul Michelsen, sum var formaður í Grundlógarnevndini, hevður sagt við Útvarpið, at stjórnarskipanin »hevur onki við donsku grundlógina at gera«.

Hetta er bert rætt í tann forstand, at stjórnarskipanin er beinleiðis í stríð við galdandi grundlóg og heimastýrisskipan.

Greiðasta ábending um, hvat meiningin við lógaruppskotinum er, kom frá løgtingsmanninum Kára á Rógvu, ið er ein av høvuðsmonnunum aftan fyri stjórnarskipanarlógina.

Hann segði herfyri í útvarpssendingini Eygsjón, at ætlanin við lógini er at »spreingja karmarnar«.

Øll vita, hvat tað merkir.

## Hvat ætlar løgmaður?

Nú er tíðin komin, har føroyingar mugu hava at vita, akkurát hvørja støðu løgmaður hevur, og hvat hann ætlar sær at gera.

Herfyri kom hann við einum tíðindaskrivi, har tað m.a. stendur, at »ein komandi føroysk stjórnarskipan má virða ta støðu, sum Føroyar hava í ríkisfelagsskapinum«.

Løgmaður skrivar eisini, at hann fer at »taka upp samband við danska forsætisráðharran og umrøða spurningin, hvørt uppskotið kann sameinast við heimastýrislógina og yvirtøkulógina«.

Øll sunn fornuft – og ein røð av løgfrøðingum – sigur, at uppskotið til stjórnarskipan er ikki sameiniligt við støðu Føroya í Ríkisfelagsskapinum.

Hvat ætlar løgmaður at gera við tað?

Hetta skyldar hann at greiða føroyingum frá.

***Nú er tíðin komin, har føroyingar mugu hava at vita, akkurát hvørja støðu løgmaður hevur, og hvat hann ætlar sær at gera.***



**Helena Dam á Neystabø**
*landsstýriskvinna í mentamálum*

# Er public service fyri øll?

Hesin spurningur varð av røttum settur í gjár á kjakfundi í Miðlahúsinum um rættindi teirra brekaðu til tænastur Kringvarpsins. Á fundinum sum Ráðið fyri Brekað skipaði fyri, varð ljós varpað á nógv áhugaverd viðurskifti. Við talandi dømum varð greitt frá, hvussu fáar av tænastum Kringvarpsins mong teirra, ið bera brek, fáa nyttu av. Til dømis vistu tey deyvu ikki av, at eitt heilsuskaðiligt øskuskýggj rak inn yvir Føroyar, tá ið Eyjafalljøkul fór at goysa. Ikki fyrr enn dagin eftir, tá ið tey sóu tíðindini teknmálstulkað.

## Nógvir møguleikar at betra tænastuna til øll

Tey deyvu og hoyriveiku halda, at alt ov fáar føroyskar sendingar verða tekstaðar og teknmálstulkaðar – og rætt er tað. Og útvarpssendingar er afturlatið land. Tað varð gjørt vart við, at tey menningartarnaðu onga sendiflatu eiga yvirhøvur, hóast tað er av eins stórum týdningi fyri tey, dagliga at fylgja við bæði tíðindum, og øðrum sendingum, ið seta dagsskránna í almenna orðaskiftinum. Víst varð á, at heimasíða, tekstvarp og miðlasavn Kringvarpsins kundu verið framúr tænastur - eisini fyri tey brekaðu, og at onnur framkomin tøkni kundi gjørt atkomuna munandi betri.

## Skal sparast, má tað raka øll líka

Kringvarpsleiðslan gjørdi vart við, at alt ov lítil fíggjarorka er til taks til hesar tænastur. Eisini tað er rætt, tað vita vit øll.

Til hesa seinastu staðfesting er kortini bert at siga, at í tí fíggjarkarmi, sum Kringvarpið til eina og hvørja tíð hevur at ráða yvir, skal rúm vera fyri tænastum til borgarar, ið bera brek. Tað er jú endamálið við "Public service", sum merkir almenn tænasta, at tænastan røkkur øllum bólkum – eisini teimum, sum av ymsum ávum ikki hava somu atkomu til almennu fjølmiðlarnar, sum tey flestu.

So má annað niðurraðfestast, um tað ikki ber til at hækka inntøkur Kringvarpsins á annan hátt. Vit hava upplivað dømi um, at Kringvarpið ætlaði at spara deyvatulking burtur, tá ið neyðugt var at spara. Tað má ikki endurtaka seg. Skal sparast, so má tað raka øll líka.

Í løtuni liggur eitt lógaruppskot í Løgtinginum, sum m.a. skal bøta um inntøkur Kringvarpsins. Um vit ætla, at eisini tey førleikaskerdu, og tey ið bera brek, skulu gjalda Kringvarpsgjald við gleði – so er uppftur meira neyðugt, at eisini tey fáa nyttu av kringvarpstænastunum. Og tað er ætlanin. Eisini tí er átroðkandi, at lógaruppskotið verður samtykt.

## Tey brekaðu sess í Kringvarpsstýrið

Nú sjóneykan varð sett á umstøður teirra brekaðu í mun til almenna upplýsing og Kringvarpstænastur yvirhøvur, fari eg at kanna møguleikan fyri at broyta kringvarpslógina, so at annaðhvørt Ráðið fyri Brekað ella Meginfelag teirra Brekaðu fær umboðan í stýrinum fyri Kringvarpið. Á tann hátt kundu vit tryggjað, at eisini teirra áhugamál verða ein natúrligur partur av dagligu fyrisitingini av Kringvarpinum.

Eg fari at takka fyri høvið at luttaka á hesum kjakfundi. Tað var ein ógvuliga læruríkur fundur.